## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið




**Veðrið í morgin:**
Hvassur vindur ella skrið av landnyrðingi, men seinnapartin minkar hann vindin nakað. Kavaælingur, men onkur sólglotti og hitalagið millum ÷1 og +2 stig. Um náttina niður í ÷5 stig.




**Veðrið leygardagin:**
Andøvsgul upp í ein strúk av landnyrðingi, seinnapartin minni vindur av norði. Sólglottar, men eisini kavaælingur og hitin millum 0 og +3 stig.




**Veðrið sunnudagin:**
Gul til stívt andøvsgul av norði og landnyrðingi og sólglottar, men eisini okkurt kavaælið. Hitalagið millum ÷1 og +2 stig.

**Veðrið mánadagin og týsdagin:**
Mánadagin minkar hann vindin niður í lot av ymsum ættum og yvirhøvur turt. Hitin um frostmarkið. Týsdagin upp í ein strúk av útsynningi og møguliga turt. Lýggjari.

# Eivør og prestur á pubb

**Sunnudagin fara Ólavur Rasmussen, prestur og Eivør Pálsdóttir at hitta suðuroyingar í pubbini á gamla kongliga handlinum á Tvøroyri**



*Avbera hugnaliga pubbin í gamla konglia handlinum á Tvøroyri, verður sunnudagin karmur um forvitnisligt tiltak við Ólavi Rasmussen, presti og Eivør Pálsdóttir, sangara og tónasmiði. Men tað er Kierkegaard, sum verður snúningspunktið*

**KIERKEGAARD**
*Áki Bertholdsen*

Sunnudagin verður forvitnisligt tiltak í pubbini í gamla kongliga handlinum á Tvøroyri.

Orsøkin til tiltakið er, at Ólavur Rasmussen, prestur í Hvalba, hevur skrivað eina bók um mæta danska heimsspekingin, Søren Kierkagaard.

Og sunnudagin klokkan 14 fer Ólavur Rasmussen at greiða frá um Kierkegaard og um bókina í gamla, kongliga handlinum hjá Thomsen. Har fer hann eisini at signera bøkur.

Sum eitt heilt serligt krydd á tiltakinum, verður ein av okkara fremstu sangarum og tónasmiðjum, Eivør Pálsdóttir, við í tiltakinum.

Anna Kirstin Thomsen, sum hevur gamla Kongliga handilin, sigur, at fremsta orsøkin til, at Eivør verður við á tiltakinum, er, at hon er sera áhugað í Søren Kierkegaard. Men nú hon kortini er við, fer hon eisini at syngja onkrar sangir.

Tey, sum kenna til umstøðurnar í gamla kongliga handlinum, vita, at har er ikki serliga vítt til veggja og høgt til lofta.

Hølið er lítið og tí er tað avmarkað, hvussu nógv fólk sleppa inn og sostatt heldur hon, at tað er neyðugt at avmarka talið á teimum, sum sleppa inn.

Av tí sama er tað neyðugt at bíleggja pláss frammanundan fyri at tryggja sær pláss.

Anna Kirstin sigur, at annars verða hátalarar settir í túnið, so tey, sum ikki sleppa inn, kunnu standa uttanfyri og lurta, vilja tey tað.

Annars verður pubbin opin allan seinnapartin og tá ið tiltakið er av, vónar Anna Kirsten at eitt sindur av útskifting av fólki verður, so at tey, sum hava staðið úti, kunnu sleppa inn.

Og Eivør fer eisini at syngja onkrar sangir fyri teimum.

**Hitalagið kring knøttin**

| | |
|---|---|
| Illulisat | -10 |
| Nuuk | -3 |
| Qaqortoq | -2 |
| Ammassalik | -7 |
| Saint John's | -- |
| Halifax | -- |
| Reykjavík | 3 |
| Seyðisfjørður | 4 |
| Tórshavn | 10 |
| Lerwick | 8 |
| Aberdeen | 2 |
| London | 8 |
| Tromsø | 6 |
| Bergen | 8 |
| Oslo | -- |
| Stokkhólm | 1 |
| Keypmannah. | 4 |
| Helsinki | 2 |
| Moskva | -1 |
| Berlin | 2 |
| Warzawa | 0 |
| Kiev | -1 |
| Bukarest | 0 |
| Paris | 6 |
| Madrid | 14 |
| Róm | 9 |
| Malorca | 15 |
| Athen | 13 |
| Malta | 18 |
| Tunis | 17 |
| Beijing | 13 |
| New Dehli | 26 |
| Bangkok | 27 |
| Jakarta | 32 |
| Sydney | -- |
| New York | 6 |
| Miami | 20 |
| Los Angeles | 26 |
| Meksikobýur | 16 |
| Panama | -- |
| La Paz | 9 |
| Rio de Janeiro | -- |
| Buenos Aires | 34 |

## LUFTTRÝSTIÐ




**Í gjár:**
Eitt lágtrýst, 995 hPa. við Lofoten fer suðureftir og dýpist. Vestan fyri lágtrýstið rekur køld luft av norði móti Føroyum.




**Í dag:**
Lágtrýstið yvir Norðsjónum stendur mestsum í stað. Køld luft rekur framvegis fram móti Føroyum.


I EINUM SAMFELAG HAR TEY VEIKASTU HAVA TAÐ GOTT, HAVA ØLL TAÐ GOTT

WWW.JAVNI.FO

JAVNI


## HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 23/11 kl. $06^{00}$– 24/11. $06^{00}$. Hitin í gjár: 5,2°
Minsti hiti máldur í nov.: - 7,2° - Mesti hiti máldur í nov.: 12,2°

## AVFALLIÐ




Avfallið: 7,0 mm – mált frá 23/11 kl. $06^{00}$– 24/11 kl. $06^{00}$
Avfallið higartil í november: 159,6 mm

www.sosialurin.fo

## VESTFALLSKYRRINDI

23. november Mánin longst frá jørðini

Kelda. Álmanakkin 2005

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | Suðuroyar-/ Vágafirði sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | Hestfirði/ Sundalagnum sp. | Vestmanna-sundi fp. | Vestmanna-sundi sp. | Mykines-firði fp. | Mykines-firði sp. | Nólsoyar-firði fp. | Nólsoyar-firði sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði sp. | Hvanna-sundi fp. | Hvanna-sundi sp. | Fugloyar-firði fp. | Fugloyar-firði sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 24. Nov. | 01.03 | 13.35 | 00.03 | 12.35 | 00.18 | 12.50 | 03.03 | 15.35 | 04.03 | 16.35 | 11.50 | - | 10.50 | 23.08 | 01.18 | 13.50 | 02.18 | 14.50 | 00.48 | 13.20 | 02.03 | 14.35 |
| 25. Nov. | 01.53 | 14.12 | 00.53 | 13.12 | 01.08 | 13.27 | 03.53 | 16.12 | 04.53 | 17.12 | 00.08 | 12.27 | 11.27 | 23.44 | 02.08 | 14.27 | 03.08 | 15.27 | 01.38 | 13.57 | 02.53 | 15.12 |
| 26. Nov. | 02.29 | 14.47 | 01.29 | 13.47 | 01.44 | 14.02 | 04.29 | 16.47 | 05.29 | 17.47 | 00.44 | 13.02 | - | 12.02 | 02.44 | 15.02 | 03.44 | 16.02 | 02.14 | 14.32 | 03.29 | 15.47 |
| 27. Nov. | 03.04 | 15.21 | 02.04 | 14.21 | 02.19 | 14.36 | 05.04 | 17.21 | 06.04 | 18.21 | 01.19 | 13.36 | 00.19 | 12.36 | 03.19 | 15.36 | 04.19 | 16.36 | 02.49 | 15.06 | 04.04 | 16.21 |
| 28. Nov. | 03.39 | 15.58 | 02.39 | 14.58 | 02.54 | 15.13 | 05.39 | 17.58 | 06.39 | 18.58 | 01.54 | 14.13 | 00.54 | 13.13 | 03.54 | 16.13 | 04.54 | 17.13 | 03.24 | 15.43 | 04.39 | 16.58 |

5 707265 100043 >